Landsbanki Føroya
Governmental Bank

Tórshavn 28-01-2005
Jnr. 2003-12-154

Lýsing av

endamálsuppgávum

landsbankans

Innihaldsyvirlit

1 Inngangur 3

2 Almennur banki 4

2.1 Lýsing 4

2.2 Krøv til fíggjarumsiting 4

2.3 Íløgurøkt 5

2.4 Skuldarumsiting 6

2.5 Felags mál fyri skuld og ogn 8

2.6 Týdningurin av óhefti 8

2.7 Starvsfólkatørvur 9

2.8 Kjarnin í uppgávuni 9

2.9 Umsiting fyri almennar stovnar og skipanir 10

3 At virka fyri tryggum fíggjarviðurskiftum 11

3.1 Lýsing 11

3.2 Váðin í fíggjarkervinum 11

3.3 Eyðkenni við føroyska fíggjarmarknaðinum 12

3.4 Landsbankans amboð 12

3.5 Týdningurin av óhefti 14

3.6 Starvsfólkatørvur 14

3.7 Kjarnin í uppgávuni 14

4 At virka fyri jøvnum búskaparvøkstri 15

4.1 Lýsing 15

4.2 Búskaparmyndil landsbankans 15

4.3 Búskaparmetingar 16

4.4 Týdningurin av óhefti 17

4.5 Starvsfólkatørvur 17

4.6 Kjarnin í uppgávuni 17

5 Samandráttur 18

1 Inngangur

Landsstýrið hevur samtykt, at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum kann fara undir at fyrireika eina tilgongd at leggja Hagstovu Føroya og Landsbanka Føroya saman í ein stovn.

Í hesum sambandi er stýrisbólkur settur, ið skal fyrireika og fyriskipa samanleggingina.

Sambært arbeiðsgrundarlagnum hjá stýrisbólkinum, skulu fylgjandi fyritreytir uppfyllast í samband við samanleggingina:

- Samanlagdi stovnurin skal verða óheftur av politiska myndugleikanum
- Samanlagdi stovunurin skal standa á Løgtingsfíggjarlógini
- Eins uppgávur skulu verða savnaðar mest møguligt
- Samanleggingin skal verða til minst møguligan ampa fyri leiðslu og starvsfólk
- Samanleggingin skal verða til minst møguligan ampa fyri framleiðsluna hjá stovnunum

Hartil kemur, at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum alment hevur boðað frá, at hóast samanlegging av stovnum, skulu allar uppgávur landsbankans varðveitast og røkjast framyvir.

Grundað á omanfyri nevndu fyritreytir, ger landsbankin hervið eina frágreiðing, ið lýsir endamálsuppgávur landsbankans.

Uppgávur, ið eru lagdar til landsbankan at umsita – sambært løgtingslóg um Landsbanka Føroya - og sum í øllum førum skulu loysast, eru:

a) at vera almennur banki,

b) at virka fyri tryggum fíggjarviðurskiftum, og

c) at virka fyri jøvnum búskaparvøkstri

Hesar endamálsuppgávur verða lýstar í hesi frágreiðing.

2 Almennur banki

2.1 Lýsing

Endamálið kann lýsast at vera *fíggjarumsiting* fyri landið, fyrst og fremst fyri landskassan, men eisini við fyrimuni fyri almennar stovnar ella skipanir, t.d. AMG og ætlaða búskapargrunnin. Harumframt eigur fíggjarumsitingin eisini at hava fyrilit fyri føroyska fíggjarmarknaðinum og harvið eisini vinnulívinum og húsarhaldunum.

Fíggjarumsitingin fyri landskassan hevur sum *mál at tryggja gjaldsførleika landskassans bráðfeingis og í longdini eins og at optimera avkast/kostnað av fíggjarogn og skuld.*

T.v.s. fíggjarumsitingin verður skild í 3 partar:

1. Krøv til fíggjarumsiting
2. Íløgurøkt
3. Skuldarumsiting

2.2 Krøv til fíggjarumsiting

2.2.1 Bráðfeingis gjaldføri

Landið hevur eins og onnur *stuttíðarsveiggj í inntøkum og útreiðslum,* sum eru ymisk, soleiðis at stundum er talan um nettoinngjald og stundum um nettoútgjald. Sveiggini kunnu vera tilvildarlig millum dagar og millum vikur, meðan ávís mynstur kunnu vera millum mánaðir og millum kvartal. Fyri at klára broytingarnar í nettogjaldingunum ber til at fáa fíggingaravtalur við ein fíggjarstovn, men av tí, at brúk er fyri tiltaksgjaldføri av øðrum grundum eisini, skal fyrilit havast fyri bráðfeingis gjaldførinum í íløgurøktini.

2.2.2 Tiltaksgjaldføri

Eitt tað mest umráðandi fyri lánførið, t.v.s. álitið frá lánveitarum og íleggjarum, eru *evnini og viljin til at rinda aftur til tíðina*, bæði lán og rentur. Tað, at tiltaksgjaldførið er hóskiligt, soleiðis at lántakarin kann svara hvørjum sítt, sjálvt um inntøkurnar svíkja eina tíð, hevur tí stóran týdning fyri lánveitarar.

Stór sveiggj í búskapinum og somuleiðis óvissa um nær og hvussu stór, ein vend kann væntast at verða, økja um tørvin og støddina á neyðugum tiltaksgjaldføri. Støddin á tiltaksgjaldførinum hevur m.a. týdning fyri, hvussu nógva tíð myndugleikarnir hava til at viðgera eina íkomnað støðu og at fyrireika tiltøk til at venda gongdini, eins og hvussu nógv tíð er til at fyrireika lántøku, um tørvur er á tí.

Tað er harafturímóti ikki neyðugt, sum hjá einum tjóðbanka, at hava tiltaksgjaldføri sum verju móti spekulativum álopum á gjaldoyra. Landsbankin (og landsstýrið) kann tí taka størri váða á seg enn ein tjóðbanki. Váðin, sum landsbankin kann taka á seg, er heldur ikki avmarkaður av lógarásettum minstukrøvum til eginognina, sum t.d. peningastovnar og eftirlønarskipanir eru tað.

2.2.3 Plasering heima ella úti

Føroyski búskapurin er nógv knýttur at livandi tilfeingi, so sum veiðu og aling av fiski, eins og hann er lítil. Hesi bæði eyðkenni gera tilsamans, at búskapurin verður fyri nógvum og til tíðir stórum sveiggjum. Hesi sveiggini ganga útyvir inntøkurnar í útflutningsvinnum og hjá húsarhaldum, sum eru knýtt at hesum vinnum og sostatt eisini

útyvir skattagrundarlagið hjá almennum myndugleikum. Inntøkurnar hjá landinum sveiggja sostatt saman við vinnuligu sveiggjunum. Landið og aðrir partar av búskapinum hava tí brúk fyri tiltaksgjaldføri samstundis. Hvussu kann tørvurin samskipast undir hesum umstøðum?

Høvuðsparturin av skuld landskassans er uttanlands. Umleið helmingurin av skuldini er til danska statin, og høvuðsparturin av brævalánunum er til útlond. Fíggjarogn landsbankans er meginparturin í Danmark. *Fyrilitið til útlendskar lánveitarar krevur, at fíggjarognin skal verða til taks og ikki langtíðarbundin.* Er henda treytin lokin, kann fíggjarognin væl standa í Føroyum.

Fíggjarstovnar, eftirlønargrunnar og privatar fyritøkur hava munandi nettoogn uttanfyri Føroyar, har serliga fíggjarjarstovnarnir hava gott gjaldføri. Setir landið t.d. pening í peningastovn, hevur tað ikki ávirkan á, hvussu stovnurin bindur peningin í útlán ella á annan hátt. Tá hinir sektorarnir tilsamans eru so gjaldførir sum nú, er tað tí beinleiðis skeivt av landsbankanum (ella landsstýrinum) at hava sínar fíggjarognir í Føroyum, burtursæð frá bráðfeingis gjaldføri.

Kemur meira javnvág í gjaldførisstøðuna hjá hinum búskaparsektorunum, tí at landsstýrið hevur lænt meira í Føroyum, ella tí at eftirlønarkapitalurin er øktur og langtíðarílagdur uttanlands, og peningastovnarnir hava tikið lán til gjaldførið sítt, tá noyðist landsstýrið eisini at hava fyrilit fyri, hvussu gjaldførisstøðan í hinum sektorunum verður ávirkað av plaseringum og lántøku hjá landssektorinum.

2.3 Íløgurøkt

Málið við íløgurøktini er at fáa best møguligt avkast við tí váða, sum er hóskiligur. Heildarmálið er tó at fáa minst møguligan langtíðarkostnað av nettoskuldini.

2.3.1 Tilevnan av strategi

Landsbankin *tilevnar uppskot til íløgustrategi og íløguheimild útfrá málsetninginum um at fáa eitt so gott avkast sum gjørligt við tí váða sum er rímiligur og avtalaður.* Strategiin verður tilevnað við støði í, hvussu stóran váða bankin er til reiðar at átaka sær, og eini meting um, hvussu langt tíðarskeiðið er, sum fíggjarognirnar kunnu bindast.

Fyri at kunna tilevna eina strategi, við innbygdum fyritreytum um, hvussu landsbankin kann fáa eitt gott avkast við einum hóskandi váða, so *má landsbankin kenna íløguuniversið*, t.e. teir ymsu aktivklassarnar t.d. partabrøv, lánsbrøv, virkislánsbrøv í ymsum gjaldoyra og teirra avkast og váðaeginleikar og somuleiðis samvariatiónina millum hesar aktivklassar.

2.3.2 Dagligar og tíðum afturvendandi uppgávur

Taktiska aktivallokeringin má endurskoðast nakrar ferðir um árið. Í hesum partinum av íløgurøktini fylgir bankin gongdini í ymsu sløgunum av aktivum og minkar um íløgur í tey virðisbrøv, (ella bólkar av virðisbrøvum, t.d. í eini vinnugrein, partabrøv í mun til ríkislánsbrøv ella virkislánsbrøv), ið vera mett at hava brúkt sínar vakstrarmøguleikar, og har væntaða framtíðaravkastið tí er minni enn áður. Landsbankin skal eisini taka avgerð, um hann skal økja um íløgur í virðisbrøv (bólkar av virðisbrøvum), har vakstrarmøguleikarnir verða mettir at vera góðir.

Landsbankin fylgir við og *metir um útlitini í búskapunum* á teimum marknaðum (londum), har landsbankin ætlar at gera ella hevur gjørt íløgur.

Av tí, at flestu íløgurøktarar eru fyritøkur, sum tæna bæði íleggjarum og útgevarum, er ráðgevingin frá teimum heft at egnu áhugamálum teirra. Landsbankin má tí eisini útvega sær kunnleika um marknaðarútlit frá óheftum keldum.

Landsbankin má eisini eygleiða, hvørji nýggj íløguprodukt verða útboðin, og meta um hesi hóska inn í verandi strategi ella um tey kunnu vera partur av eini nýggjari og betri íløgustrategi.

2.3.3 Útbjóðing, eftirlit og eftirlitsskipanir

Landsbankin bjóðar út íløgurøðir til aðrar íløgurøktarar at fyrisita og ger tí eisini *útbjóðingartilfar til tílíkar útbjóðingar*. Serligan týdning hevur ásetingin av benchmarki og váðaavmarkingum, tá bankin bjóðar út eina íløgurød, tí hetta ásetur rásarúmið hjá íløgurøktarunum.

Landsbankin fylgir við gongdini í útbodnum íløgurøðum, og at íløgurøktarin heldur seg innan fyri tær avmarkingar, sum landsbankin hevur ásett.

Landsbankin *fylgir eisini samlaða váðanum* (á egnum og útløgdum íløgurøðum tilsamans), og teimum avmarkingum og íløguheimildum, sum nevnd bankans hevur ásett.

Bankin má av og á *útvega og endurnýggja skipanir til rapportering* av perioduavkasti, væntaðum ella mettum framtíðaravkasti, og sum kann fylgja við, at íløgufyrisitingin bæði innanhýsis og uttanhýsis heldur seg innan fyri teir karmar, sum nevnd bankans hevur ásett.

2.3.4 Kjarnuførleikar og ábyrgd

Landsbankin hevur lagt seg eftir at leggja tænastur út til onnur, har hesi kunnu røkja tær betri ella bíligari. Uppgávan at tilevna grundleggjandi strategiir, m.a. at viga møgulig framtíðaravkast móti tí váða bankin átekur sær, og at hava eftirlit við, at íløgurøktarar halda seg innan fyri avtalaðu váðakarmarnar, eru kjarnuførleikar, sum bankin ikki fer at útdelegera. *Uttan mun til, hvør myndugleiki røkir tiltaksgjaldføri landskassans, so fær hann ikki útdelegerað ábyrgdina av avkastmálum og váða, og hevur tí fyri neyðini at hava fólk við hesum kjarnuførleikum.*

2.4 Skuldarumsiting

Málið við skuldarumsitingini er at fáa minst møguligan langtíðarkostnað við tí váða, sum er neyðugur, fyri at megna gjaldsskyldur landskassans. Heildarmálið er tó at *fáa minst møguligan langtíðarkostnað av nettoskuldini.*

2.4.1 Lántøka

Fyrimyndarliga sæð *lænir landið fyri at fremja útbyggingar ella bygnaðartillagingar ella fyri at kunna halda virksemið og mótvirka eini konjunkturniðurgongd.* Tá so inntøkur seinni koma frá hesum tiltøkum (útbyggingum ella bygnaðartillagingum), so eigur skuldin somuleiðis fyrimyndarliga sæð at minka. Tað kann eisini vera, at *myndugleikarnir ynskja at økja vælferðina nú við lántøku*, tí at varandi inntøkuvøkstur er á veg, sum tó ikki beinleiðis er knýttur at tiltøkum frá myndugleikunum sjálvum, men m.a. kann stava frá einum meira dynamiskum vinnulívi, ella tí at olja er funnin í landinum.

Tað, sum er avgerandi fyri, um lántøkan hevur verið fyrimyndarlig, er um *væntaður inntøkuvøkstur gerst veruleiki ella um ein niðurgongd í inntøkum vísir seg at koma av tíðaravmarkaðari konjunkturniðurgongd og ikki av bygnaðarligum trupulleikum.* Stavar

inntøkuafturgongdin frá meira varandi og bygnaðarligum trupulleikum, so dregur landið vekslar uppá framtíðina, sum kann gerast dýrt og oyðileggjandi.

Umframt at tryggja sær sjálvum, at lántøkan er fyrimyndarlig, skulu myndugleikarnir eisini sannføra lánveitarar um, at hon eisini er gagnlig fyri teir. Landið skal við øðrum orðum skapa sær eitt lánføri/kredittvirði millum lánveitarar og íleggjarar.

2.4.2 Lánføri

Lánførið (kredittvirðið) hjá einum landsmyndugleika, sum hjá øðrum lántakarum, er mest knýtt at gongdini í teimum mest týðandi fíggjar- og búskapartølunum. *Trygdin í inntøkugrundarlagnum* (ella skattagrundarlagnum) er ávirkað av, um búskapurin er fjøltáttaður ella fátáttaður. Hesi viðurskifti hava týdning fyri, hvussu stór *sveiggini í inntøkunum* kunnu væntast at verða. Meira eintáttaður vinnubygnaðurin er, tess ótryggari kann inntøkugrundarlagið væntast at verða. Eisini kann tað vera ein spurningur, hvørt altjóða búskapargongdin er til fyrimuns ella til vansa fyri verandi vinnubygnað.

Harnæst er tað týðandi, *hvussu myndugleikarnir stýra sínum útreiðslum og inntøkum*, og um útreiðslurnar kunnu uppihaldast í longdini. Tað hevur somuleiðis týdning, *hvussu góður umsitingarligi bygnaðurin er til at stýra útreiðslum og inntøkum.* At enda kann nevnast, at tað hevur týdning, hvørt breið ella lítil politisk semja er um búskaparpolitisku kósina og um at gera tillagingar, um neyðugt.

Eyðsætt eru *góðar upplýsingar um búskapin og fyrisitingina* eisini av stórum týdningi fyri álitið hjá lánveitarum til lánføri myndugleikans. Góð hagtøl og eftirfarandi metingar um samanhangir og útlit hava tí stóran týdning fyri bæði myndugleikar og lánveitarar.

2.4.3 Lánsmarknaðir og rating

Lánsmarknaðir eru ymiskir og seta ymisk *krøv til samskiftið millum lántakara og lánveitara.*

Størri bankar og stovnsligir íleggjarar hava ofta egna lánførisdeild. Á teimum marknaðum, teir velja at virka á, gera teir *metingar um lánføri hjá lántakarum* og taka støðu um at gera íløgu ella ikki út frá hesum metingum. Landsstýrið er virkið á hesum marknaðum.

Nógvir íleggjarar, sum gera egnar metingar, meta als ikki um allar lántakarar. Aðrir íleggjarar eru ov smáir til at hava egna lánførisdeild. Nógvir tílíkir íleggjarar spjaða íløgurnar víða, og halda seg til lántakarar, sum hava fingið eitt ratingstig frá einum ratingstovni. Hetta ratingstigið sigur nakað um lánføri lántakarans. *Landsstýrið hevur ikki fingið rating* enn og er tí ikki virkið á hesum øki.

Heimamarknaðurin fyri lánsbrøv er vanliga vissasti lánsmarknaður fyri landsmyndugleikar, tí at landið vanliga er besti afturgjaldari í landinum, og tí at heimligu íleggjararnir kenna væl landið sum lántakara. Hinvegin er tað *ikki vanligt, at landsmyndugleikar læna beinleiðis frá bankum av tí, at ósaklig viðurskifti mangan stinga seg upp millum myndugleikar og heimligar bankar*, tá annaðhvørt myndugleiki ella banki fær trupulleikar. ES-londini hava í Maastricht sáttmálanum bannað limastatunum at hava beinleiðis lán frá innlendskum bankum orsakað av vandanum fyri at misnýta valdsstøðuna millum partarnar. Føroya landsstýri lænir ikki beinleiðis frá føroyskum bankum, men selur heldur ikki nógv lánsbrøv til føroyingar enn.

Hesi viðurskifti benda á, at *tørvur er á at menna atgongd landsstýrisins til lánsmarknaðir heima og úti*. Ratingstig frá ratingstovni hevði víðkað møguleikar landsstýrisins munandi. Harafturat hevði tað verið ein góð upplýsing til heimligar og útlendskar íleggjarar, sum

umhugsa at gera íløgur í føroysk almenn og privat virðisbrøv, um skuldin hjá landsmyndugleikanum hevði ratingstig. Hetta hongur saman við, at skuldin hjá fyritøkum vanliga verður virðismett í sammeting við statsskuldina (sum verður benchmark). Eisini eigur menningararbeiði at verða gjørt til at økja umsetningin av landslánsbrøvum á sekundera virðisbrævamarknaðinum, t.v.s. umsetningin aftaná útgávuna.

2.5 Felags mál fyri skuld og ogn

Nógvir spurningar eru at taka støðu til, tá strategi skal leggjast fyri umsiting av ogn og skuld.

Gjaldførar fíggjarognir, ið skulu brúkast við stuttari ávaring, geva vanliga minni avkast, enn fíggjarognir, sum kunnu bindast í longri tíð. Hetta krevur, at ætlaða avkastið verður vigað upp ímóti váðanum fyri tapi, um ognin verður bundin ov leingi.

Við at lata part av skuldini hava sama varleika, sum fíggjarognin hevur, kann váðin av ogn og skuld neutraliserast og minkast samanlagt.

Hevur landsstýrið gott altjóða lánføri, so tekur tað styttri tíð at fyrireika lántøku eins og tað verður bíligari at læna, enn um lánførið er vánaligt. Skjótari tað er at fyrireika lántøku, minni kann tiltaksgjaldførið eisini verða. Tað er tí umráðandi at virka fyri best møguligum lánføri.

Ein effektivur marknaður fyri føroysk virðisbrøv, økir um lánsmøguleikar landskassans við brævlántøku og styrkir harvið lánførið.

Umframt at virka fyri einum vælvirkandi fíggjarmarknaði er málið fyri ognar- og skuldarrøktina at fáa minst møguligan langtíðar kostnað av nettoskuldini.

2.6 Týdningurin av óhefti

Fleiri orsøkir eru til, at landsbankin heldur seg betur kunna røkja uppgávuna sum almennur banki, um hann er óheftur.

Landsbankin ger strategi um, hvussu tiltaksgjaldførið skal plaserast fyri at fáa eitt gott avkast, har stjórin hevur ábyrgd fyri at gera uppskot til strategi og at umsita strategiina, meðan nevndin góðkennir strategiina og hevur eftirlit við umsitingini. Tess størri avkast landsbankin ynskir, at íløgurnar skulu geva, tess størri váða má hann átaka sær. Líkindini eru góð fyri at fáa góð langtíðaravkast á henda hátt, men av og á verða vánalig avkast. Tað er komið fyri, at eitt ár við vánaligum avkasti hevur fört til harðligan kritikk, sum er komin illa við hjá landsstýrismanninum. *Verður fíggjarumsitingin og ábyrgdin av íløgunum ov tætt knýtt at landsstýrismanninum, er vandi tí fyri, at váðin av íløgunum verður minni og avkastið tí eisini minni*

Seinast í 1980-árunum lat landsstýrið seg ávirka til at flyta tiltaksgjaldføri, sum tað hevði í donskum bankum, heim í føroysku peningastovnarnar, tí hesir høvdu gjaldføristrupulleikar. Hetta varð gjørt hóast landsstýrið stutt eftir hevði brúk fyri tiltaksgjaldføri. Eisini seinnu árini, t.d. í 2000, hava peningastovnarnir ávirkað løgtingið og landsstýrið til at lata pening hjá almennum stovnum verða verandi í peningastovnunum. *Tað er tí umráðandi, at gjaldførið verður umsitið av óheftum fakligum stovni.*

Ein stovnur við tøttum sambandi við landsstýrismannin í figgjarmálum fær tað eisini truplari at røkja uppgávuna at skipa fyri lántøkum til landskassan. Tá landskassin tekur

upp lán frá altjóða lánsmarknaðunum, er ein av uppgávunum at gera metingar av væntaðu gongdini í føroyska búskapinum. *Metingarnar um búskapargongdina fáa minni trúvirði, um tær verða gjørdar av stovni, sum er heftur av politisku myndugleikunum.*

2.7 Starvsfólkatørvur

Gjøgnumgongdin frammanfyri vísir, at brúk er bæði fyri fólki við búskaparfrøðiligum og fíggjarfrøðiligum førleikum fyri at útinna eina nøktandi fíggjarumsiting.

Niðanfyri í talvu 1 er høvuðsyvirlit yvir hvørjir fakbólkar røkja hesa uppgávu og hvussu nógv arbeiðstíð varð brúkt í 2004. Uppgávan krevur 3,81 ársverk , ið eru samansett av 3 fakbólkum. Búskaparfrøðiførleikin verður í høvuðsheitum nýttur til skuldar- og ognarumsiting (strategi-arbeiði) og til menningarverkætlanir. Starvsfólk við kunnleika til fíggjarvirksemi eru partur av allari fíggjarumsitingini, t.v.s. hesi arbeiða við gjaldføris-, skuldar- og ognarumsiting, meðan skrivstovufólk tekur sær av skráseting av hagtølum fyri fíggjarsektorin.

Talva 1: Orkukrav til uppgávuna "At vera almennur banki"

2004	Ársverk		Luttakaratal	
	Til uppgávu	*Av ialt**	*Til uppgávu*	*Av ialt*
Búskaparfrøðingar	2,01	4,91	5	6
Fíggjarfrøðingar	1,70	1,70	2	2
Skrivstovufólk	0,10	0,10	1	1
Tilsamans	**3,81**	**6,71**	**8**	**9**

* Totalur fyri ársverk og luttakaratal er fyri røkt av høvuðsuppgávum landsbankans, t.v.s. leiðsla og felagsuppgávur eru ikki við

Orsøkin til, at 3,81 ársverk eru samansett av 8 starvsfólkum er, at partar av fíggjarumsitingini, ið verða røktir til ávísar tíðir á árinum, krevja meiri orku enn til aðrar tíðir. Tølini vísa, at 5 av í alt 6 búskaparfrøðingum nýta 40% av samlaðu ársverkum teirra til røkt av hesari uppgávu, men av tí, at orkukravið er so skiftandi gjøgnum árið, kann stórur partur av hesari orku t.d. verða savnaður á eitt stutt tíðarskeið av árinum. Samansetingin av førleika/ársverkum til røkt av fíggjarumsitingini er sostatt greitt tekin um, at ávísar uppgávur seta *krøv til breiða vitan yvir styttri tíðarskeið*.

Arbeiðsbýtið er sum nevnt gjørt fyri 2004, men er helst eisini umboðandi fyri 2003, av tí at tyngdin í menningaruppgávum hevur ligið her hesi bæði árini. Onnur ár hevur tyngdin í menningaruppgávum ligið aðrastaðni, t.d. í 2000, og 2001 tá samráðingar vóru um virðisbrævamarknaðin.

2.8 Kjarnin í uppgávuni

- → *Føroyski búskapurin útsettur fyri stórum sveiggjum á inntøkusíðuni*
- → *Landsins gjaldførið verður tryggjað við, at løgtingslóg áleggur einum óheftum fakligum stovni at taka sær av uppgávuni*
- → *Nøktandi lánførið krevur álítandi kunning til lánveitarar*
- → *Lánsmarknaðir seta krøv til samskifti millum lánveitara og lántakara*
- → *Ábyrgdin av avkastmálum og váða liggur hjá landsins myndugleikum*
- → *Felags fyrilit í pørtum av umsitingini av gjaldføri, ogn og skuld gera tað neyðugt at samskipa hesi viðurskifti strategiskt*
- → *Uppgávan setir krav til breiða vitan og ymiskar førleikar*

2.9 Umsiting fyri almennar stovnar og skipanir

Skipanir sum Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin og Búskapargrunnurin til sína tíð, hava brúk fyri sama slag av førleika, sum umsitingin av landsins gjaldføri krevur.

Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin skal skipa fyri tryggum og støðugum eftirlønum til pensjonistar nú og í vaksandi tali fram í tíðina við inntøkum, sum fylgja gongdini í búskapinum við stuttíðarsveiggjum og megingongd, sum búskapurin mennist. T.v.s., at hann skal byggja upp fíggjarogn til at javna fyri sveiggj í búskapinum og fyri vaksandi talið av eftirlønarmóttakarum. Grunnurin hevur tí brúk fyri bæði fíggjarfrøðiførleika og búskaparfrøðiførleika til at fastleggja strategi og umsiting.

Búskapargrunnurin skal til sína tíð spara upp inntøkur frá oljuútvinning og øðrum líknandi ikki varandi stórum inntøkum og síðan javnast til framtíðar ættarlið við mest gagnligu ávirkan á búskapin og varandi livifótin fyri eyga. Hesin grunnurin hevur eisini brúk fyri búskaparfrøðiligum og fíggjarfrøðiligum førleika til at fastleggja strategi og umsiting.

Báðar hesar skipanir hava brúk fyri at halda fíggjarstøðu og rakstur greidliga skildar frá landskassans leypandi viðurskiftum. Umsitingin eigur tí eisini at verða óheft av politisku leiðsluni í landsstýrinum.

3 At virka fyri tryggum fíggjarviðurskiftum

3.1 Lýsing

Endamálið er at *útvega dagførda vitan um gongdina og støðuna í fíggjarsektorinum og fíggjarviðurskiftum eins og at virka fyri tillagingum, sum styrkja tryggleikan, smidleikan og kappingarførið í fíggjarsektorinum og í fíggjarviðurskiftum og búskapinum sum heild.*

Fíggjarligur stabilitetur verður ofta defineraður av sentralbankum í Evropa og BIS (Bank of International Settlement) sum "at tryggja at fíggjarsektorurin er nóg sterkur til, at fíggjarmarknaðirnir kunnu tryggja effektiva midling av kapitali millum teir búskaparligu sektorarnar. T.v.s. fyritøkur, húsarhald, tað almenna og útlond".

Orsøkin til hetta serliga fokus á fíggjarligan stabilitet kemst av, at *ótrygg fíggjarviðurskifti hava søguliga havt stór fíggjarlig tap við sær* (í øðrum londum ofta 10-15% av BTÚ, í Føroyum upp til 50% av BTÚ), tí at fíggjarstovnarnir eru so týðandi fyri búskapin og tí at teir hava ein lutfalsliga váðiligan virkismyndil - m.a. tað at taka ímóti stuttum innlánum og veita long útlán og soleiðis at fáa ein rentumarginal. Fíggjarligur óstabilitetur hevur verið staðfestur í nógvum bæði meira og minni framkomnum londum, eisini seinnu árini.

Ein vælvirkandi fíggjarskipan er avgerandi fyri búskaparligum vøkstri. Tað er tí umráðandi at minka vandan fyri óstabiliteti, um tað er gjørligt.

3.2 Váðin í fíggjarkervinum

3.2.1 Stovnseftirlit

Danska Fíggjareftirlitið (Finanstilsynet) hevur eftirlitið við donsku og føroysku peningastovnunum, tvs stovnseftirlitið ella mikroeftirlitið. Uppgávan hjá Fíggjareftirlitinum er at hava eftirlit við einstaka stovninum og at tryggja at hesin ikki brýtur lógarásettu krøvini - m.a. solvenskravið 8%, reglur fyri leiðsluna, avmarking av stórum einstøkum millumverandi, o.s.fr.

3.2.2 Kerviseftirlit

Danmarks Nationalbank fremur eitt yvirskipað kerviseftirlit ella makroeftirlit, har fokus er á heildarváðan í øllum danska fíggjarsektorinum. Hann skal sostatt ansa eftir og staðfesta møguligar vandakeldur, sum kunnu ávirka allan ella stórar partar av fíggjarsektorinum.

3.2.3 Ábyrgdarbýti millum Føroyar og Danmark fyri kerviseftirliti

Danmarks Nationalbank hevur ikki ábyrgd fyri stabilitetinum í føroyska fíggjarkervinum ella øðrum serstøkum pørtum av danska fíggjarsektorinum, so leingi óstabilitetur á hesum økjum ikki er til vanda fyri allan danska fíggjarsektorin. Ábyrgdin fyri føroyska búskaparpolitikkinum liggur sambært heimastýrislógini hjá føroysku landsmyndugleikunum. Harvið liggur *ábyrgdin fyri stabilitetinum í fíggjarkervinum eisini hjá føroysku myndugleikunum.*

Landsbankalógin áleggur landsbankanum, at virka fyri tryggum fíggjarviðurskiftum.

3.2.4 Lender of last resort

Hinvegin hevur Danmarks Nationalbank sum sentralbanki skyldu til at útvega einum føroyskum peningastovni gjaldføri, um hesin kemur í gjaldføristrot, sum ikki skyldast

solvenstrupulleikum. Metir tjóðbankin harafturímóti, at trygdirnar hjá peningastovninum ikki eru nóg góðar, vil hann helst ikki veita gjaldføri uttan at fáa trygdir frá onkrum øðrum. Ein grásona er tí hugsandi at vera millum gjaldføristrupulleikar og solvenstrupulleikar, har sentralbankin vil halda uppá, at talan er um solvenstrupulleikar, fyri at sleppa undan tapsváða, meðan føroyskir myndugleikar halda uppá, at talan er um gjaldføristrupulleikar. Trupulleikin endar tí helst mangan hjá føroyskum myndugleikum, sum tí noyðast at verða fyrireikaðir til at viðgera eina tílíka støðu.

3.3 Eyðkenni við føroyska fíggjarmarknaðinum

3.3.1 Luttøka í altjóða arbeiðsbýti

Føroyar eru ein opin búskapur, sum luttekur í altjóða arbeiðsbýtinum. Hetta sæst ikki minst av, at inntøkurnar úr útlondum í 2004 svara til 61% av BTÚ, og útreiðslurnar til útlond svara til 55% av BTÚ. Somuleiðis sæst tað av, at ogn og skuld í útlondum í 2003 svara til ávikavist uml. 100% og 60% av BTÚ.

Altjóða búskapurin er fyri støðugari broyting av øllum handa slagi. Føroyski búskapurin er somuleiðis fyri broytingum í egnum viðurskiftum (t.d. tilfeinginum) og í samskiftinum við altjóða búskapin. Hesar broytingar ávirka bæði framleiðsluna og fíggjarstøðuna og sostatt eisini fíggjarlig millumverandi millum búskaparligu sektorarnar.

Trygg fíggjarviðurskifti fáast tí best við, at *neyðugar tillagingar verða framdar so skjótt, sum til ber, og ikki hópa seg upp til bygnaðarligar trupulleikar*. Stovnsligar skipanir (vinnu- og skattalógir m.a.) eiga at virka til fyrimuns fyri tillaging. Somuleiðis má fylgjast við, hvussu gongdin er, og til tess *krevjast hagtøl og metingar*.

3.3.2 Ávirkiligur fíggjarmarknaður

Føroyski fíggjarmarknaðurin er í ávísan mun ein lokalur marknaður. Hóast føroyski búskapurin er opin, hevur hann og serstakliga fiskivinnan egnar konjunkturar og lutfalsliga stórur partur av útlánunum til fiskivinnuna er frá føroysku peningastovnunum. Sveiggj í fiskivinnuni síggjast tí skjótt aftur í millumverandi við peningastovnarnar. Av tí at føroyski búskapurin er so lítil, er tað ikki sannlíkt, at fíggjarligur óstabilitetur í Føroyum breiðir seg til Danmark og onnur lond. Hinvegin er meira sannlíkt at *altjóða óstabilitetur kann breiða seg til føroyska fíggjarsektorin*.

3.3.3 Stovnar í fíggjarsektorinum

Føroyski fíggjarsektorurin er merktur av tveimum stórum peningastovnum av tilsamans fýra og einum stórum tryggingarfelagið av tveimum. Stovnarnir eru undir almennum eftirliti og tykjast at vera væl riknir. Teir stóru eru tó so stórir, at teir mugu roknast fyri at vera "too big to fail". *Landsmyndugleikarnir hava brúk fyri at kenna til, hvør váðin og hvørji útlitini eru í sektorinum*, bæði fyri búskapin sum heild og fyri at kenna tørvin fyri almennari luttøku í møguligum kreppuloysnum.

3.4 Landsbankans amboð

Fyri at landsbankin kann røkja sína uppgávu "at virka fyri tryggum fíggjarviðurskiftum í Føroyum", krevst innlit í ymiskar hugsandi vandar, sum kunnu føra til ótryggleika. Ein tílíkur vandi er váðin fyri tapum í fíggjarsektorinum. Tap kunnu koma í orsakað av broytingum á marknaðum fyri t.d. valuta, lánsbrøv ella partabrøv, fall í ómaksgjøldum, tapi av útlánum og broytingum í innláns- og útlánsrentum. Niðanfyri eru dømi um áhugaverdar spurningar í samband við váða í fíggjarkervinum:

1. Í hvønn mun kunnu tap breiða seg til aðrar fíggjarstovnar
2. Generella gongdin á marknaðum fyri lánsbrøv, partabrøv, valuta osv.
3. Sveiggj í virðinum á aktivum, ið eru latin sum trygd - t.d. á húsum og á aktivum í kapitaltungum vinnugreinum.
4. Bygnaðarlig ójavnvág í vinnugreinum, sum kann elva til útbreitt og varandi minni avkast í vinnugreinunum
5. Hvussu stórur partur av fíggjarsektorinum er ávirkaður av somu vinnugrein ella sama slag av váða
6. Í hvønn mun breiða búskapartrupulleikar seg millum vinnugreinar, sum lænt verður út til

3.4.1 Amboð til eftirlit við sektorinum

Landsbankin er í ferð við at útbyggja hagtøl, sum kunnu brúkast til at staðfesta hugsandi váðar, m.a. MFI hagtøl og roknskapardátur. Hesi fíggjarhagtøl verða so brúkt til at kanna verandi váðamyndina í fíggjarsektorinum. Harumframt kunnu hesi hagtøl brúkast til góðskutrygging av øðrum hagtølum og metingum og til at útbyggja búskaparmyndil landsbankans á hesum øki.

Tað er umráðandi at samskifta við fíggjarsektorin og at gera frágreiðingar til almenningin og landsstýrið um hesi viðurskifti fyri at økja um innlitið í búskapin.

Út frá tí almennu váðamyndini, sum kanningarnar vísa á, fer landsbankin at virka fyri at fjølbroyta fíggjarsektorin og at økja um kunnleikan til fíggjarváða fyri m.a. at mótvirka óstabiliteti og at styrkja fíggjarsektorin. Landsbankin hevur m.a. , sum nevnt aðra staðni, virka fyri at menna brævlántøku landskassans, og niðanfyri er ein lýsing av arbeiðinum at stovna ein føroyskan virðisbrævamarknað.

Fyri at náa hesum máli er *neyðugt støðugt at menna fíggjarhagtøl, kanningarambo og frágreiðingar* soleiðis at til ber at fylgja menningini í fíggjarsektorinum.

3.4.2 Virðisbrævamarknaður Føroya (VMF)

Landsbankin hevur í fleiri ár virkað fyri einum føroyskum *virðisbrævamarknaði, fyri at fáa ein meira fjølbroyttan og sterkari fíggjarsektor*, og fyri at skapa møguleikar fyri meira dynamiskum fyritøkum. Fyritøkur, sum eru skrásettar á einum virðisbrævamarknaði, hava betri atgongd til eginpening, enn tær, sum ikki eru skrásettar, og hava tí betri møguleika at ávirka samansetingina av eginogn og læntum peningi. Hetta eru viðurskifti, sum kunnu ávirka váðafýsni og dynamikkin í fyritøkuni.

Serstakliga hava eftirlønarskipanir strangar avmarkingar fyri, hvussu stórar íløgur kunnu gerast í óskrásett virðisbrøv. Hetta merkir, at eftirlønaruppsparing hevur lítlar møguleikar fyri at verða sett í føroysk virðisbrøv, og verður tí í stóran mun sett í útlendsk virðisbrøv. Íløgumøguleikarnir hjá útlendingum eru tí avmarkaðir av somu grund. Útgáva av partabrøvum frá fyritøkum og lánsbrøvum frá myndugleikum og fyritøkum skapar tí møguleika fyri íløgum frá tílíkum føroyskum og útlendskum íleggjarum.

Eisini fíggjarfyritøkur og samfelagið sum heild kunnu fáa gleði av einum virðisbrævamarknaði, sum gevur møguleika fyri betri konsolideraðum vinnulívi. Fíggjarfyritøkur fáa minni váða av at læna út til tílíkar fyritøkur, og fyri samfelagið sum heild verður váðin spjaddur nógv meira, enn hann er í dag.

Luttakarar á føroyska fíggjarmarknaðinum stovnaðu í 2000 saman við fíggjarmálaráðnum og landsbankanum P/F Virðisbrævamarknað Føroya, sum síðan saman við Kauphøll Íslands hevur stovnað marknað fyri føroysk virðisbrøv á íslendska virðisbrævamarknaðinum.

Dagliga leiðslan og skrivstovan hjá felagnum er í landsbankanum, sum eisini er kontaktliðið millum íslendska marknaðin og føroyska samfelagið.

3.5 Týdningurin av óhefti

Sum nevnt frammanfyri er tað m.a. ábyrgdin fyri búskaparpolitikkinum, sum ger, at ábyrgdin fyri at varðveita trygg fíggjarviðurskifti liggur hjá føroysku landsmyndugleikunum.

Landsstýrið og løgtingið ávirka fíggjarkervið við búskaparpolitikki, sum fíggjarpolitikki og bygnaðarligum tiltøkum, t.d. kappingarlóg, veðsetingarreglum fyrio fiskivinnu og aling, virðisbrævaskatting o.s.v.

Tann stovnur, ið hevur til uppgávu at virka fyri tryggum fíggjarviðurskiftum, noyðist tí bæði at meta um støðuna í fíggjarkervinum og tað sum ávirkar hana, t.d. búskaparpolitikkin.

Trúvirðið á metingunum verður væl betri, um stovnurin, ið ger tær, er óheftur av politisku leiðsluni í landsstýrinum.

3.6 Starvsfólkatørvur

Í talvu 2 sæst, at í 2004 vórðu brúkt 1,80 ársverk , og at tað bert eru búskaparfrøðingar, ið røkja hesa uppgávu.

Talva 2: Orkukrav til uppgávuna "At virka fyri tryggum fíggjarviðurskiftum"

2004	Ársverk		Luttakaratal	
	Til uppgávu	*Av ialt**	*Til uppgávu*	*Av ialt*
Búskaparfrøðingar	1,80	4,91	5	6
Fíggjarfrøðingar	0,00	1,70	0	2
Skrivstovufólk	0,00	0,10	0	1
Tilsamans	**1,80**	**6,71**	**5**	**9**

* Totalur fyri ársverk og luttakaratal er fyri røkt av høvuðsuppgávum landsbankans, t.v.s. leiðsla og felagsuppgávur eru ikki við

Henda uppgávan er undir uppbygging og fer eisini frameftir at verða arbeiðskrevjandi. Við verandi arbeiðsíløgu fer tað at taka nakað av tí, áðrenn vit eru væl fyri til at fyribyrgja fíggjarligum óstabiliteti.

3.7 Kjarnin í uppgávuni

→ *Ábyrgdin fyri tryggum fíggjarviðurskiftum liggur á føroyskum hondum*
→ *Virka fyri, at fíggjarskipanin er vælvirkandi og stabil*
→ *Veiting av hagtølum og metingum av fíggjarviðurskiftum*
→ *Greiningar av váða – áhaldandi og ad hoc*
→ *Landsstýrið hevur brúk fyri at kenna støðu og útlit í fíggjarsektorinum*
→ *Neyðugt við áhaldandi menning av hagtølum, kanningarambodum og frágreiðingum*
→ *Partur av uppgávuni er meting av førdum búskaparpolitikki – hetta krevur óhefti*

4 At virka fyri jøvnum búskaparvøkstri

4.1 Lýsing

Málið er at fáa realistiskar upplýsingar og fatanir um støðu, gongd og útlit fyri føroyska búskapin.

Frammanfyri eru lýstar búskaparligar fortreytir fyri fíggjarumsiting og fyri at kunna virka fyri tryggum fíggjarviðurskiftum. Her verður komið inn á búskaparstýring, búskaparmyndilin og búskaparmetingar.

Av tí, at Føroyar ikki hava egið gjaldoyra, og at pengapolitiski myndugleikin harvið liggur á øðrum hondum, er møguleiki fyri tiltøkum til javnan av búskaparsveiggjum einans á fíggjarpolitiska økinum. Javnan av føroyskum búskaparsveiggjum henda í høvuðsheitum á 2 ymsar hættir: antin við fíggjarpolitiskum tiltøkum ella við sjálvvirkandi útjavnarum. Dømir um sjálvvirkandi útjavnarar eru inntøkuskatturin og ALS-gjaldið, ið eru viðvirkandi til, at sveiggini í tøku inntøkuni eru minni enn bruttoinntøkan. Tað er útbreidd semja innan tjóðarbúskaparligt ástøði, at ein á fíggjarpolitiska økinum í størst møguligan mun skal halda seg til sjálvvirkandi útjavnarar og bert gera nýtslu av fíggjarpolitiskum tiltøkum tá størri sveiggj út yvir tað vanliga gera seg galdandi ella eru ávegis.

Bæði royndir og ástøði vísa, at tað við fíggjarpolitiskum tiltøkum er møguligt at ávirka samlaða eftirspurningin í búskapinum. Hinvegin vísir tað seg at vera trupult at meta um, hvørji tiltøk geva best úrslit fyri samlaða búskapin og hvussu stór ávirkanin vil vera. Undir øllum umstøðum veldst um, hvussu búskaparstøðan sær út. Tískil er neyðugt, at politiska skipanin og almenningurin sum heild, við jøvnum millumbilum eru kunnaði um búskaparstøðu landsins, soleiðis, at møgulig fíggjarpolitisk tiltøk verða sett í verk á fullgóðum grundarlagi.

Landsbankans uppgáva at virka fyri jøvnum búskaparvøkstri fevnir tískil í høvuðsheitum um at gera *leypandi metingar av búskaparstøðu landsins og í ávísan mun kunnað politisku skipanina og almenningin um hesa*. Harumframt er tað í hesum sambandið ein týðandi uppgáva at eygleiða um tað er *samsvar millum búskaparstøðu og førdan fíggjarpolitikk* og um neyðugt koma við *óheftari ráðgeving/tilmælum* hesum viðvíkjandi.

4.2 Búskaparmyndil landsbankans

Búskaparmyndil landsbankans er ein samlað mynd av føroyska búskapinum, ið inniheldur sambond millum vinnur, sektorar og endaliga nýtslu. Myndilin hevur samanhangir, sum ger tað møguligt at *vísa á sannlíka gongd í búskapinum við ávísum fyritreytum*.

Kjarnin í myndlinum er ein input/output-talva, ið inniheldur býti av veitingum hjá vinnugreinum til innlendis framleiðslu og endaliga nýtslu (røðirnar), umframt býti av nýtslu hjá vinnugreinum av innlendis veitingum, innflutningi, skattum/avgjøldum/stuðli, lønum og restinntøku (teigarnir ella kolonnurnar). Røðirnar í talvuni kunnu tískil fatast sum ein sundurbýting av vøru- og tænastukontoini í tjóðarroknskapinum á vinnugreinir og teigarnir sum sundurbýting av framleiðslukontoini og intøkuskapanarkontoini í tjóðarroknskapinum á vinnugreinir.

Til greiningar hevur IO-talvan ta fyritreyt, at framleiðslan hjá einari vinnugrein hevur konstant skalaavkast, umframt at býti av framleiðslunýtslu hjá vinnugreinini er konstant.

Harumframt tryggjar tekniski bygnaðurin av IO-talvuni, at totalurin fyri røðir og teigar fyri hvørja einstaka vinnugrein er eins, t.v.s. ein rød fyri eina vinnugrein vísir, hvar framleiðsluvirðið endar og teigurin fyri somu vinnugrein vísir býti av hesum virði á input til framleiðslu og løn til framleiðslufaktorar.

Við hesum sambondum millum vinnugreinir/endaliga nýtslu, og júst nevndu innbygdu fyritreytum, er møguleiki fyri at greina, hvørja ávirkan ymisk sannlík viðurskifti hava á vinnugreinir og samlaðu búskaparstøðuna.

Av tí, at tað finst eintýtt knýti millum vinnugreinir og sektorar, er møguligt at knýta aðrar partar av tjóðarroknskaparuppgerðini í IO-talvuna, soleiðis at greiningarmøguleikarnir økjast. Útbyggingarætlanirnar av myndlinum fevna sostatt um eftirstandandi partar av tjóðarroknskapinum. M.a. eru ætlanir um, at skattir, veitingar og nýtsla fyri sektorar verða partur av myndlinum, við tí fyri eyga, at úrslit fyri tøku inntøkuna fáast til vega. Harumframt er ætlanin at fáa fíggjarjavnan við inn í myndilin, soleiðis at møguleiki fyri greiningum av fíggjarstøðuni hjá sektorum verður til staðar.

Umframt at hava sum mál at gera støðugt betri metingar, fer nýtslan og menningin av myndlinum fyrst og fremst fram við atliti til tær uppgávur, sum eru álagdar landsbankanum at røkja. Myndilin er mentur gjøgnum mong ár og støðugt útbygdur, bæði hvat viðvíkur innihaldi og tøkni, umframt at nýtslan breiðir seg til alsamt fleiri øki, bæði innan- og uttanhýsis.

Uttanhýsis kemur myndilin m.a. fíggjarmálaráðnum og løgtingsins fíggjarnevnd til góðar tá ætlan fyri fíggjarlóg skal gerast, umframt at fjølmiðlar og almennir stovnar eisini seta fyrispurningar um útlit fyri føroyska búskapin. Metingar fyri útlitum verða m.a. eisini kunngjørdar í Information Memorandum og kemur sostatt almenninginum her heima og uttanlands í hendi.

Tað er vert at leggja til merkis, at tað finst eingin annar búskaparmyndil í landinum, sum dagliga verður hildin við líka og umsitin til tess at verða amboð til at geva nágreiniliga og breiða meting av búskaparstøðu landsins.

4.3 Búskaparmetingar

Hagstovan hevur um hendi savnan av keldutilfari til framleiðslu av tjóðarroknskapinum. Landsbankin harafturímóti tekur við har hagstovan sleppur og ger metingar 2-3 tey eftirfylgjandi árini. T.d. hevur hagstovan í løtuni endaliga tjóðarroknskaparuppgerð til og við 2002, meðan landsbankin hevur metingar fyri árini 2003, 2004 og 2005. Og tað er við myndlinum sum týdningarmesta amboðið, at hesar metingar við jøvnum millumbilum verða gjørdar.

Tá ein meting skal gerast verður fyrst syrgt fyri, at allar hagtalskeldur eru dagførdar. Tann seinasta árliga tjóðarroknskaparuppgerðin hjá hagstovuni leggur støði fyri høvuðstølini í myndlinum, og keldurnar, ið leypandi verða dagførdar (mánaðarliga) eru lønargjaldingar, útflutningur og innflutningur skift á vinnugreinir. Mánaðarligu hagtalskeldurnar stava eisini frá hagstovuni og verða av landsbankanum framroknaðir til total fyri árið (t.v.s. eftirverandi mánaðir í árinum verða framroknaðir), áðrenn tær verða lagdar inn í myndlilin.

Eftir hetta skal støða takast til viðurskifti, ið viðvíkja endaligu nýtsluna og sum ikki beinleiðis eru knýtt at hagtalskeldunum. Ávísur kanningarháttur verður fylgdur til

greiningar av gongd, støðu og útlitum hjá vinnugreinum, ið eru fyri avgerandi broytingum, umframt at metingar skulu gerast av almennari og privatari nýtslu/íløgum.

Fyri at gera meting av tí samlaðu búskaparstøðuni fyri árini 2003-2005 á fullgóðum grundarlagi, hevur til dømis verið neyðugt við neyvari kanning av gongdini, støðuni og útlitinum hjá alivinnuni hesi árini. Her hevur landsbankin m.a. gjørt greiningar av roknskapum og haft samband við vinnuna, soleiðis at serfrøðin á økinum verður partur av metingunum. M.a. hevur gongdin í lønum og undirskoti í vinnuni broytt lutføll í framleiðslusamansetingini í myndlinum. ILA-sjúkan og prísniðurgongdin á marknaðinum fyri laksi/sílum hevur m.a. ávirka útseting av smolti seinnu árini og saman við ávísum biologiskum faktorum eru eftirfarandi metingar fyri framleiðslu, goymslubroytingum og útflutningsvirði tøk og harvið partur av metingunum av samlaðu búskaparstøðuni fyri hesi árini. Líknandi ad hoc kanningar av øðrum vinnum, m.a. fiskivinnu og fiskiveiðu hava eisini verið gjørdar. Alt í alt er neyðugt við *umfatandi kanningararbeiði til hvørja meting*, ið verður gjørd.

Til tess at vísa á viðkvæmi í búskapinum verða vanliga 3 framtíðarmyndir (grundscenario, best case og worst case) settar upp við hartil hoyrandi fyritreytum.

4.4 Týdningurin av óhefti

Í samband við uppgávuna at virka fyri jøvnum búskaparvøkstri skulu metingar gerast um búskaparligu støðuna, gongdina og útlitini, og um hvørja ávirkan búskaparpolitikkurin fær á hesi viðurskifti. Er stovnurin, sum ger hesar metingar leysur av politisku fyrisitingini, er tað meira sannlíkt, at lánveitarar, politiska andstøðan, fjølmiðlar og almenningur uppfata metingar og ráð sum óheft.

4.5 Starvsfólkatørvur

Í talvu 3 sæst, at í 2004 vórðu brúkt 1,10 ársverk . 4 av 6 búskaparfrøðingum landsbankans eru knýttir at hesi uppgávu. Orkan verður í størstan mun løgd í menning og viðlíkahald av búskaparmyndli. Umframt hetta verður orka nýtt til framskrivingar og greiningar, ið eisini eru tætt knýtt at búskaparmyndlinum.

Talva 3: Orkukrav til uppgávuna "At virka fyri jøvnum búskaparvøkstri"

2004	Ársverk		Luttakaratal	
	Til uppgávu	*Av ialt**	*Til uppgávu*	*Av ialt**
Búskaparfrøðingar	1,10	4,91	4	6
Fíggjarfrøðingar	0,00	1,70	0	2
Skrivstovufólk	0,00	0,10	0	1
Tilsamans	**1,10**	**6,71**	**4**	**9**

* Totalur fyri ársverk og luttakaratal er fyri røkt av høvuðsuppgávum landsbankans, t.v.s. leiðsla og felagsuppgávur eru ikki við

4.6 Kjarnin í uppgávuni

- → *Gera metingaar av búskaparstøðu landsins, kunna poltitisku skipanina og almenning leypandi og koma við óheftari ráðgeving og/ella tilmælum*
- → *Búskaparmyndil landsbankans er avgerandi amboð í hesum arbeiði*
- → *Búskaparmyndilin er eisini partur av øðrum uppgávum á stovninum*
- → *Búskaparmetingar landsbankans eru grundaðar á umfatandi kanningararbeiði*
- → *Òhefti av politisku skipanini er avgerandi fyri nøktandi røkt av uppgávuni*

5 Samandráttur

Tíggju starvsfólk vóru fast í landsbankanum við ársenda 2004. Av tí, at ein búskaparfrøðingur var settur í árinum fyri ein, sum fór í annað starv, var talið av ársverkum í árinum 9,35.

Førleikarnir á stovninum fevna um 6 búskaparfrøðingar, 2 fíggjarfrøðingar, 1 teldufrøðing (verkfrøðing) og 1 skrivstovufólk.

Felagsfunktiónirnar eru ikki lýstar frammanfyri og fevna um fyrisiting, kunningartøkni og leiðslu. Sum víst í talvu 4 fóru 2,64 ársverk til felagsfunktiónirnar í 2004. Tvey fólk hava meginpartin av tíðarnýtsluni, meðan 7 fólk hava luttikið tilsamans.

Talva 4: Starvsfólkanýtslan í 2004 býtt á felagsfunktiónir og endamálsuppgávur

2004	Ársverk				*Luttakara tal*
	Búskaparfrøðingar	*Fíggjarfrøðingar*	*Aðrir førleikar*	*Ialt**	
Felagsfunktiónir	0,44	0,30	1,90	2,64	7
Almennur banki	2,01	1,70	0,10	3,81	8
Trygg fíggjarviðurskifti	1,80	0,00	0,00	1,80	5
Javnur búskaparvøkstur	1,10	0,00	0,00	1,10	4
Tilsamans	**5,35**	**2,00**	**2,00**	**9,35**	**10**

Endamálsuppgávan at vera almennur banki er lýst í parti 2 og vísir í høvuðsheitum, hvørjar avbjóðingar eru fyri at loysa uppgávuna.

Í íløgurøktini verður arbeitt við at meta um og gera strategi, har kunnleiki krevst til íløgumøguleikar, gongdina á fíggjarmarknaðum og gongdina í altjóða búskapi. Eisini fevnir røktin um dagligu umsitingina, sum lutvíst er í egnum hondum og lutvíst er løgd til umsitarar við íløguavtalum. Kunnleiki krevst til gongdina á marknaðunum eins og eftirlit skal havast við, um íløgurnar samsvara við strategi og avtalur. Menningararbeiði hevur verið av at finna hóskiliga strategi fyri tiltaksgjaldførið. - Umsiting av íløgum kann leggjast út, men ábyrgdin fyri strategi og eftirlit við strategi kann ikki leggjast út til fyritøkur við vinnuligum áhugamálum.

Í skuldarumsitingini er ikki nógv arbeiði av at røkja lánini, sum landskassin hevur frá danska ríkinum. Menningararbeiði hevur hinvegin verið av at fáa í lag lánsbrævalántøkuna hjá landinum, har arbeiði m.a. hevur verið gjørt fyri at finna fram til hóskiliga lántíð og kostnað. Arbeiði er framvegis at gera fyri at styrkja handilin við landslánsbrøvum í Føroyum. Uttanlands eru góðar sølukanalir, men hetta er á einum avmarkaðum marknaði, sum fevnir um lánveitarar, ið ikki krevja, at skuldin er ratað. Ein týðandi menningaruppgáva er tí, at útvega landinum ratingstig frá altjóða ratingstovni. Information Memorandum við bygnaðarligum og búskaparligum upplýsingum hevur verið gjørt síðan fyrst í 1990-árunum, men fær aftur størri týdning nú fyri at upplýsa lánsbrævaíleggjarar. Kunnleikakrøvini eru her eins og við íløgurøktini fíggjar- og búskaparfrøðilig.

Samskipað strategi fyri landsins ogn og skuld kann minka um samlaða váðan. Hetta er vorðið møguligt, nú partur av lánunum frá statinum eru endurfíggjað við lánsbrøvum.

Menning av brævalántøku landsins, m.a. við at styrkja søluna av lánsbrøvum í Føroyum, kann styrkja virðisbrævamarknaðin, landsstýrið sum lántakara og føroyska fíggjarkervið.

Førleikin, sum verður bygdur upp í íløgurøktini, eigur eisini at koma øðrum skipanum til góða. Landsbankin hevur fíggjarumsitingina fyri Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin um hendi, og kann við fyrimuni eisini røkja búskapargrunnin til sína tíð.

Endamálsuppgávan at virka fyri tryggum fíggjarviðurskiftum er lýst í parti 3, har m.a. verður grundgivið fyri, at ábyrgdin fyri trygdini er hjá føroysku landsmyndugleikunum, eins og víst verður á, hvørji sløg av spurningum skulu svarast fyri at kenna váðarnar í fíggjarkervinum.

Landsbankin byggir upp fíggjarhagtøl um fíggjarvirksemi, sum tað er brúk fyri í arbeiðinum, eins og ætlanir eru um at útbyggja búskaparmyndilin til at kanna nakrar spurningar á økinum.

Kunnleikakrøv eru praktiskur og ástøðiligur kunnleiki til fíggjarmarknaðir og til heimliga og altjóða búskapin.

Endamálsuppgávan at virka fyri jøvnum búskaparvøkstri er lýst í parti 4, og snýr seg í stóran mun um at útvega neyðuga vitan um búskapin, støðuna, gongdina og útlitini.

Arbeiðið at útvega neyðuga vitan um føroyska búskapin er í stóran mun neyðugt fyri at røkja lántøkuna fyri landsstýrið, soleiðis at lánveitarar kunnu fáa dagførdar og relevantar upplýsingar. Hetta arbeiði kemur eyðsæð eisini øðrum tilgóða.

Menningararbeiðið er í stóran mun at útbyggja búskaparmyndilin, sum nú í stóran mun er ein samskipan av input-output sambondum og búskaparligum sektoruppsetingum. Myndilin verður tillagaður so hvørt tjóðarroknskapararbeiðið hjá hagstovuni mennist.

Búskaparmetingar verða gjørdar við samanhangum í myndlinum, hagtølum og ad hoc upplýsingum fram til verandi ár. Saman við upplýsingum um útlit á nøkrum økjum, verður myndilin brúktur til at fáa fram útlit fyri samlaða búskapin í fyrstu syftu 1 ár fram í tíðina.

Lýsingin vísir greitt, at týðandi synergieffektir eru av at røkja hesar endamálsuppgávur í sama stovni, tí at førleikakrøvini umskarast so nógv. Tað sæst m.a. av, at 3,8 ársverk eru í 2004 útint í fíggjarumsitingini, meðan 8 fólk onkuntíð í árinum hava verið virkin á hesum øki. Sama fyribrigdi ger seg galdandi í hinum endamálsuppgávunum.

Nógvar menningaruppgávur eru at gera í øllum trimum endamálsuppgávum. At mest orka er brúkt í bankapartinum, kemur m.a. av at menningaruppgávur hava fylt nógv í 2003 og 2004. Ein orsøk til hetta hevur verið, at landsstýrið kundi spara uml. 30 mió kr á fíggjarlógini fyri 2004 og árini aftaná við at leggja lán út á marknaðin. Henda menningin ætlast eisini at fáa gagnliga ávirkan á fíggjarkervið. Vigingin av menningaruppgávunum kann væl fara at líkjast í hesum og komandi ári.

Verður stovnurin sundurskildur fara hesar gagnligu ávirkanirnar fyri skeyti, ella mugu tær byggjast uppaftur av nýggjum. Óynsktar fylgjur skuldi ein hugsað sær í báðum førum.

Týdningurin av óhefti hjá tílíkum stovnum sum landsbankanum eigur ikki at verða undirmettur.

Útreiðsluøkini hjá landsstýrinum hava einfaldari og skilligari mál enn inntøkuøkið og stýringin av búskapinum, tí tað almenna veitir borgarunum tænastur og inntøkuveitingar. Tá tað snýr seg um búskapin og fíggjarkervið, røkja sterk og vælskipað feløg og fyritøkur eginánugamálini hjá einstaklingum og fyritøkum. Tí er tað umráðandi við einum fakligum stovni, við greiðum endamáli at røkja felags samfelagsáhugamál og einum bygnaði, sum ger hann føran fyri at fylgja endamálinum.

Hesar eginleikar hevur landsbankin. Tað er umráðandi, at ein nýskipan ikki ger enda á hesum eginleika.